# Bygdarráðsfundur - stytt

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 12.11.2020 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Sten Spange Larsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka tvey mál við aftrat – koma á skrá sum mál nr. 11 og 12.

1. **Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 421d/421a og 434g/439d í Sandvík.**
   Søkt verður um marknaumskipan, matr. nr. 421d letur umleið 300 m2 til matr. nr. 421a og matr. nr. 434g letur umleið 115 m2 til matr. nr. 439d.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

2. **Umsókn um byggiloyvi til íbúð á matr. nr. 57c í Nesi frá S.N.B.**
   Søkt verður um loyvi at byggja íbúð við kvisti á norðaru hálvu á tekjuni á húsum felagsins matr. nr. 57c í Nesi.
   **Tekniska nevnd**:
   Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsgeranum.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at geva byggiloyvi til broytta nýtslu og aftratbygging á matr. nr. 57c sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum.

3. **Umsókn um loyvi at seta upp mastur og skúr í Rókhaga, matr. nr. 529a.**
   Søkt verður um loyvi at seta upp mastur og lítlan skúr í sunnasta parti av Rókhaga, matr. nr. 529a.
   **Tekniska nevnd:**
   Friðingarnevndirnar hava givið loyvi, so nevndin mælir til at geva loyvi.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at geva loyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at uppsetingin/byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda loyvi og at treytir frá friðingarnevndunum verða fylgdar.

4. **Umsókn um byggiloyvi til landstøð í Nesi frá P/F Bakkafrost Farming.**
   Umsókn um bygging av landstøð út ímóti Agnavík í Nesi.
   **Vega- og havnanevndin 11.11.2020**:
   Nevndin mælir til, at P/F Bakkafrost Farming fær tey viðurskifti í rættlag, sum byggimálsviðgerin vísir á.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at beina málið aftur í Vega- og havnanevndina.

5. **Uppskot til broyting av leigusáttmála matr. nr. 80a – P/F Bakkafrost.**
   Uppskot til broyting, har leigaða økið er víðkað við umleið 1.000 m2 aftrat verandi 2.800 m2 – leigugjald kr. 114.000,- um árið.
   **Vega- og havnanevndin 11.11.2020:**
   Nevndin mælir til at bíða við at góðkenna leigusáttmálan, til fundur hevur verið millum kommununa, Bakkafrost og SNB.
   **Fíggjarnevndin 12.11.2020:**
   Nevndin hevur sama tilmæli sum Vega- og havnanevndin.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at beina málið aftur í Vega- og havnanevndina.

6. **Skriv frá Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag viðvíkjandi Royndini.**
   Søkt verður um, at Royndin fær fast pláss í bátahylinum í Nesi.
   **Vega- og havnanevndin 11.11.2020**:
   Nevndin mælir til, at Royndin fær atløgupláss í Nesi, har 2 armar verða festir við tilhoyrandi rampu uppá betong bryggjukantin, sunnanfyri verandi bátabrúgv.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

7. **Umsókn um uppnormering á barnagarðsstovu í 3 mánaðir.**
   Søkt verður um 17,5 tímar eyka um vikuna á barnagarðsstovu í 3 mánaðir.
   **Trivnaðarnevndin 04.11.2020:**
   Mælt verður til at játta umbidnu tímarnar.
   **Fíggjarnevndin 12.11.2020:**
   Nevndin mælir til at játta umbidnu tímarnar í 3 mánaðir.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

8. **Felagsundirvísing í føroyskum fyri tilflytarar í Suðuroynni.**
   Ætlanin er at skipa eitt felags útbúgvingartilboð í Suðuroynni fyri tilflytarum.

**Trivnaðarnevndin 04.11.2020:**
Nevndin mælir til, at Gunnhild Mortensen, ið luttók á fundinum í Hovi, leggur fram ætlanina á bygdarráðsfundinum og at atkvøtt verður um hetta á fundinum.
**Fíggjarnevndin 12.11.2020:**
Samtykt varð einmælt at taka støðu á bygdarráðsfundinum, aftaná at Elsa Birgitta Petersen og Jóna Christiansen hava verið inni á fundi.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at taka undir við tilboðnum um felagsundirvísing, treytað av, at allar kommunurnar í Suðuroynni eru við í hesum.

**9. Fíggjarætlan 2021 – 1. viðgerð.**
Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til kr. 30.165.000, íroknað útreiðslur til eldrasamstarvið í BHS kr. 8.245.000 og afturgjald av skuld 3.270.000. Inntøkurnar eru mettar til kr. 31.474.000, harav inntøkan frá eftirlønargjøldum, DIS og FAS er kr. 8.274.000, sambært nýggjastu metingini hjá FMR.
**Fíggjarnevndin 12.11.2020:**
Samtykt varð einmælt at mæla til, at skattaprosentið verður hækkað til 20,75% og barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 6.500.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**10. Eykajáttan 2020 – 1. viðgerð.**
Eykajáttanin er á kr. 1.280.000,-.
**Fíggjarnevndin 12.11.2020:**
Nevndin hevur viðgjørt umsókn um eykajáttan 2020 kr. 1.280.000 og hevur ongar viðmerkingar.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**11. Jólagávur til øll húsarhald.**
**Trivnaðarnevndin 04.11.2020:**
Nevndin mælir til at geva jólagávu til hvørt húsarhald í sóknini aftur í ár.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**12. ABC fyri sálarligari heilsu.**
**Trivnaðarnevndin 04.11.2020:**
Nevndin hevur umrøtt málið um samskipara í sóknini og mælir til, at Maud Egholm Joensen verður samskipari fyri Hvalbiar sókn.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**13. <u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundur lokin kl. 18.45

Janus Thomsen

Eir J. Norðberg

Magni Bertholdsen

Niels Olaf Eyvindsson

Gunnhild Mortensen

Rúni Thomsen

Sten Spange Larsen